# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Røkka ella støkka

Samgongan hevur loksins fingið fíggjarlógaruppskotið fyri Løgtingið, men hetta merkir sum kunnugt ikki, at semja er sum hetta uppskot. Heildarmyndin er sostatt, at landsstýrið hevur lagt fram eitt fíggjarlógaruppskot, sum semja ikki er um. Hetta merkir so aftur, at fíggjarlógin fyri 2010 skal gerast liðug í Løgtinginum ella rættari í Fíggjarnevndini.

Hetta at fíggjarlógaruppskotið fer fyri løgtingið á hendan hátt er sjálvsagt fult lógligt, men tað er samstundis enn eitt dømi um vánaliga áralagið í samgonguni. Har minnilutastjórnir eru, er tað heilt vanligt, at stjórnin útvegar sær parlamentariskan meiriluta til ymsar partar av fíggjarlógini frá fleiri ymiskum flokkum í viðkomandi löggávutingi. Hetta hevur leingi verið meginreglan í eitt nú Danmark. Hetta er á mangan hátt ein góð skipan, tí hon tryggjar breiðan stuðul til fíggjarlógina og hon gevur eisini vissu fyri einum ávísum stabiliteti í fíggjarlógartilgongdini.

Tað, sum vit uppliva nú er, at landsstýrið so at siga hevur sítt egna fíggjarlógaruppskot, meðan alt bendir á, at partar av løgtinginum longu í forhond hava sítt egna uppskot. Vit hugsa her um tunnilsósemjurnar, har ein partur av samgonguni við hava tunnilstimeout og ein annar vil halda fast um upprunaliga tunnilsætlaninar. Vit hava áður umrøtt júst hendan partin av ósemjuni og skulu ikki fara aftur í smálutir við spurninginum um time out fyri tunnilsætlaninar.

Hinvegin er tað nærliggjandi at spyrja, hvat hesar ósemjur siga um landsstýrissamgonguna og hennara førleikar at loysa fíggjarligu og búskaparligu trupulleikarnar. At ein meirilutasamgonga ikki ger eitt fíggjarlógaruppskot liðugt er sum heild eitt vánaligt signal. Hetta er enn eitt av mongum dømum um, at henda ABC samgongan hevur trupult við at røkja sína meginuppgávu, sum er at stýra landinum og leggja fram ein politikk, sum kann bøta um avleiðingarnar av altjóða fíggjarkreppuni. Tað er í lagi at hava eitt hall av tí støðd, sum liggur í fíggjarlógaruppskotinum. Men øll vita, at vit kunnu ikki endurtaka hesa siðvenju í fleiri fylgjandi fíggjarár. Landsstýrissamgongan má í seinasta lagi, áðrenn fíggjarlógaruppskotið fyri 2011 verður lagt fram, hava uppskot til ein politikk, sum kann leiða til javnvág á almenna búskettinum. Hetta merkir, at antin mugu nýggjar inntøkur finnast ella útreiðslur minkast ella má finnast ein samanseting, ein kombinatión av báðum hesum. Hartil má samgongan koma við einum búskapar- og vinnupolitikki, sum kann fáa gongd á aftur og steðga vøkstrinum í arbeiðsloysinum. Hetta er ikki lætt, hetta krevur m.a. ein nýggjan fiskivinnupolititikk og hetta krevur, at flokkar skulu hugsa ein heilt nýggjan skattapolitikk. Yvirlivir samgongan hesa fíggjarlógina, so má hon fara til verka at finna loysnir og breiðar semjur, tí loysnirnar verða politiskt tungar og fíggjarliga dýrar. Nú má røkka ella støkka.

**Sosialurin**

## Fleiri CTD kanningar?

JENIS AV RANA



**Er nýggjasta útsøgn landsstýrismansins eftirfarandi, mugu kommunulæknarnir fáaa loyvi at senda fleiri fólk til CTD kanningar!**

Í løgtinginum h. 16 sept. svaraði landsstýrismaðurin í heilsumálum, Axel Johannesen, fyrispurningum um sjúkuna CTD. M.a. varð spurt um egingjald fyri kanningar, genkanningar ella ikki, um mótstríðandi serfrøðingaúttalilsir o. m.a. Flestu vóru samd um, at var ivi áðrenn, so bøttu svarini ikki um hendan. Og eg skilji at sami ivin og ógreiðan hevur volt fíggjarnevndarlimum stórt høvuðbrýggj, og kravt innkalling av fleiri serfrøðingum. Hesir hava so aftur avdúka, at ikki øll, sum eru fremst á økinum, geva somu ráð.

Sjálvur havi eg, av sorgarsøgum, og útfrá samskifti við sjúklingar og serfrøðingar, valt at senda so mong, sum eg meti eiga at fara, men eisini tey, sum av ótta og ófriði ynskja tað, til rannsóknir - helst bæði CT Dblóðroyndarmátinginaog genkanningar. Veit væl at hetta er kostnaðarmikið, men meti, at hetta samsvarar við lækanligu skyldu mína, at viðgera og bjarga, og at mannalív hvørki mugu ella kunnu roknast í krónum og oyrum.

### Men so kom órógv í

Men bráddliga boyttist møguleikin hjá kommunulæknanum at bíleggja hesar royndir útfrá egnari sannføring. Treytir vórðu lagdar við- treytir, sum als ikki hóvaðu mær og fleiri. Men harraboðini komu frá hægri stað. Nú skuldi ikki leitast eftir berarum, tóat allir føringar, lærdir og leikir, sum lurtaðu eftir fyrilestri í miðlahúsinum/ Rás 2, fingu boð frá hægsta serfrøðinginum á økinum, at: *berarar mugu finnast og berarar mugu viðgerast. Nei*, svaraði landsstýrismaðurin í løginginum, og vísti til sama serfrøðing, sum tó ikki hevur tikið orð síni aftur- *berarar skulu ikki viðgerast*. Og so brúkti hann ein nýggjan trumf: *berarar eru frískir, og vit kanna ikki frísk fólk. Vilja hesir frísku berarar kannast, mugu teir sjálvir gjalda, vit kunnu ikki gjalda fyri kanning av frískum fólkum*.Tóat rættleikin av hesum seinasta verður mótprógvað hvønn dag, lata vit tað fara í hesari grein.

### Men týsdagin broytist alt aftur

Í sosialinum týsdagin hálsar landsstýrismaðurin bráddliga umaftur, tó uttan frágeiðing ella tilvísing til nakra vísind. Nú stendur fíggjarnevndin fyri skotum, og limirnir har fáa at vita, at játta teir ikki her og nú tann peningin, sum ætlaðu kanningarnar av teimum, *sum sb. landsstýrismanninum eru frísk*, fer at kosta ( meira enn egingjaldið uppá ein hundrakrónuseðil), kann tað krevja mannalív.

### Ivin má koma øllum til góða

Eg og onnur við mær, eisini læknaligir og genetiskir serføðingar, hava úrslitaleyst roynt at fingið landsstýrismannin at taka øll atlit við í hesum trupla máli. Sjálvandi skulu allir føringar, og serliga nú ivamálini eru so mong, sleppa av við nagandi ivan um hann, hon ella kanska børnini (og til tað kevjast tveir berarar sum foreldur) hava ættarbregði til hesa herviligu sjúku!

Nú landsstýrismaðurin opið játtar, at hesi "*frísku*", kunnu doyggja av sjúkuni, hómi eg møguleikan fyri, at kommunulæknarnir aftur fáa fult frælsi at røkja sínar sjúklingar eftir egnari sannføðing. Tað inniber eisini, at fígjarnevndin mælir til játtan av tí peningi, ið er neyðugur, til hesar kanningar. Og at vit politikkarar ikki áleggja annað egingjald enn tað, ið sum skattur samhaldsfast verður kravt inn frá hvørjum einstøkum føringi til m.a. kanningar í heilsuverki okra.

## Samgongan avgerð íløgurnar - og ikki andstøðan

ALFRED OLSEN

løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin



Nú samgongan hevur lagt fíggjarlógaruppskotið fyri 2010 fyri Tingið, fegnist eg um tær íløgur til nýgerð av landsvegum í Eysturoynni, ið eru uppskotinum, tí uttan pengar verður onki arbeiði gjørt.

Sum tingmaður búsitandi í Eysturoynni eri eg, saman við øllum hinum Eysturoyar tingmonnunum, fegin um, at Eysturoyggin hevur fingið eina so stóra og eftir míni metan, rættvísa íløgujáttan í landsveganetið fyri 2010.

Samgongan hevur sett av pengar til hesar íløgur til nýgerð av landsvegnum í Eysturoy í 2010: *Sí talvu*

### Andstøðan

Sjálvt um tíðindamaðurin saman við tinglimum í andstøðuni, roynd at geva andstøðuni ein ráka av ávirkan í Degi og Viku týskvøldið, so er hetta ein hvørvisjón, tí veruleikin er tann, at somu tingmenn og flokkar, "læstu seg sjálvar úti" fyri einum ári síðani og standa nú úti á berajólum, uttan nakra ávirkan á hvørjar íløgur verða gjørdar í 2010, men eg vóni og vænti, at teir koma at taka undir við uppskotinum viðv. íløgunum í Eysturoynni.

### Skálafjarðartunnilin

Tað undraði, at íløgan í Skálafjarðartunnilin ikki varð viðgjørd í innslagnum, tí hon kemur at hava kollveltandi positiva ávirkan á umhvørvið og alt miðstaðar-økið. Men kann orsøkin vera tann negativi holdningurin, hesir flokkar hava til, at eitt privat felag fær loyvi til at gera og reka tunnilin fyrstu árini?

| | |
|---|---|
| **Skálabotnur – Strendur**, | 2,4 mió. |
| **Vegurin omanfyri Skálafjørð** | 8,0 mió. |
| **Vegagerð í Leirvík**, | 5,0 mió. |
| **Rituvíkarvegurin** | 3,5 mió. |
| **Brúgvin um Streymin** | 7,0 mió. |
| **Skálafjarðartunnilin** (ráðg.) | 1,1 mió., |
| ella í alt | 27 mió. kr. |

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.